Hoyringsskriv til 154B

Tað hjálpir ikki at seta uppskotið í gildi, uttan so at lógin verður broytt.

Vit vístu á, tá skattaumleggingin var fyri, at tað ber ikki til at strika 154B, áðrenn HT lógin er broytt.

Og hon kann bert broytast við at siga upp norðurlendsku skattaavtaluna ELLA við at spyrja, um menn vilja gjalda til HT, HÓAST lógin sigur øðrvísi.

Og skal tað gerast, so má lógin broytast, so at heimild er fyri at spyrja.

Verður tað gjørt, so rinda summir dupult gjald, og har er so spurningurin, hvørt tað er rætt.

Ein háttur KUNDI verið at spurt Norra, um til ber at gera eina sín ámillum avtalu millum Norra og Føroyar, har ein partur (30-40-50%) av norska heilsutrygdargjaldinum kemur heim til Føroya.

Skipanirnar, sum menn virka undir, eru ymiskar. Taka vit fiskimenn í Norra, so gjalda teir 100% skatt her heima umframt 8,2% til Folketrygd.

8,2% er tað, sum eftirlønin verður roknað útfrá. Av gjaldinum fer ymiskt, men eftirlønin verður roknað útfrá 8,2% upphæddini.

Føroyskir myndugleikar hava roynt at vunnið fram við, at alt fer ikki til eftirløn, og tað passar, men kortini er samlaða eftirlønin, sum hesi fáa, roknað út eftir fullum NAV gjaldi.

Taka vit støðuna her heima, so skulu 12% rindast inn, 40% fer í skatti beinanvegin, og so skal restin inn at forrentast. Men har fer eisini okkurt av. Fast gjald verður í øllum førum tikið av til umsiting. So kann spyrjast, um tað er rætt at skattast 40% av samlaðu upphæddini, tá ein partur fer til annað enn reina eftirlønaruppsparing. Og hvussu nógv frá hvørjum inngjaldara fer til annað enn uppsparing?

Men forrentingin verður roknað av samlaða inngjaldinum.

Vit ávaraðu tykkum í desembur, at skattaumleggingin kundi elva til, at tit mugu fara at spæla tykkum við orðum. Tit kunnu velja at siga, at tit fara at fáa alt av ongum - ella einki av øllum.

Um uml. 70 mans fluttu bústað, so fór skattaumleggingin at geva stanton. Tvs at tit fóru at fáa effinett tað sama inn, sum áðrenn umleggingina.

Men tá var bara roknað við teimum, sum arbeiddu uttanfyri landoddarnar. Nú vísir tað seg, at føroyskir fiskimenn við FØROYSKUM skipum eru farnir at flyta – fyri at sleppa undan føroyska okursskattinum. Eivind gjørdi ein væl brúkiligan túr uppundir jól. Tveir av manningini høvdu bústað í Danmark, og teir høvdu um 50.000 meira eftir, enn hinir, sum búðu í Føroyum. Síðani tá eru aðrir fluttir. Her er talan um ungar menn uttan skyldur her heima, so nú melur skjótari av snælduni, enn um talan bara var um okkum, sum starvast uttanlands. Hugsið tykkum, um, ella rættari TÁ, ungir menn við Klakki, Gadus, Arctic Viking, Enniberg, Tróndi Í Gøtu osfr, fara at flyta av landinum av skattaávum.

Og so koma vit aftur til uppskotið: Gularótin í uppskotinum er bara til teir, sum longu gjalda skatt í Føroyum, og teir fækkast. Tí norðmenn byggja nógv nýggj skip til vindídnaðin, og higartil eru bara tveir føroyingar (sum eg veit um) farnir tann vegin. Nógvir eru spurdir, og onkrir teirra hava spurt meg um ráð, og eg havi svarað, at fíggjarliga er betri, at teir eru í norsku oljuvinnuni á norskari havleið.

Vindmylluskipini lokka ofta við betri løn, men endaúrslitið er verri fyri teir føroyingarnar, sum fara hagar. Norðmenn fara av oljuskipum inn í vindídnaðin, og har koma viðhvørt føroyingar inn í staðin. Sama er við skipunum í alivinnuni. So flytingin burtur frá okurskattinum er longu byrjað.

Hetta uppskotið ber brá av at trýsta mold í rivur í eini byrging, sum er um at bresta. Skaðin á byrgingina hendi, tá alt ov nógv vatn brádliga varð fylt í hana. Skaðin hendi, tá skattaumleggingin varð framd.

Vit rinda skatt í Føroyum, tá arbeiðið á skipi í oljuvinnuni fer fram uttanfyri norska havleið, og vit rinda skatt í Norra, um arbeiðið fer fram á norskari havleið. Og har er eingin munur á NIS ella NOR ella monnum við altjóða sáttmála.

Uppskotið er bert miðað til teir, sum longu gjalda skatt her heima.

Og so hjartasuffini: Vit fingu fundarboð, tá skattaumleggingin var fyri. Vit møttu, greiddu frá, men fingu at vita, at málið var komið so langt, at tað vendist ikki aftur.

Og tað er at halda fólk fyri tað turra spott. Hoyringarnar mugu vera ÁÐRENN lógaruppskotini verða løgd fram.

Og so eitt afturat. HT er BARA galdandi í Føroyum. Tvs at eru vit, sum arbeiða uttanlands, ikki tryggjað aðrastaðni (les í arbeiðslandinum) gjøgnum arbeiðsgevaran, so fáa vit null, niks og nada, um vit skuldu fingið skaða uttalands - uttan so at vit tekna okkara egnu dýru trygging.

Og norski arbeiðsgevarin vil hava okkum í Folketrygd.

Fyri at sitera Stauning: Folketrygd, egintrygging ella kaos.

Magni Skaale,

formaður í Antares